## Mona Lisa kanska sjálvsmynd

Kanska var Leonardo da Vinci samkyntur. Og kanska var kendasti málningurin hjá honum í veruleikanum ein sjálvsmynd. Ein bólkur av granskarum frá italska mentanararvsstýrinum eru so uppsettir at prógva hesa teoriina, at teir hava biðið um loyvi at grava restirnar av kenda listamálaranum upp aftur, so kannast kann, um skølturin líkist tí á Monu Lisu. Hildið verður, at da Vinci liggur grivin í einum kapelli við borgina Amboise í franska Loiredalinum, skrivar danska blaðið Politiken.



## Bretland úr kreppuni

Vøksturin í bretska búskapinum gjørdist ikki so stórur sum vónað var, nevniliga 0,1 prosent í fjórða ársfjórðingi í mun til triðja ársfjórðing. Tað vísa hagtøl í dag. Harvið er Bretland nú alment komið úr kreppuni, tó við minni vøkstri enn væntað. Búskaparfrøðingar høvdu sambært Bloomberg News roknað við einum vøkstri á 0,4% um ársfjórðingin, meðan fallið um árið var væntað at vera 3,0%. Í triðja ársfjórðingi fall BTÚ við 0,2% í mun til undanfarna ársfjórðing og 5,1% í mun til sama tíðarskeið í fjør, skrivar boersen.dk.

# ri og tað er sjúklingurin



*- Vilja tey trý sjúkrahúsini ikki vísa vilja til samstarv og finna tey ikki eitt felags stev innan rímiliga tíð, mugu aðrir bollar í suppuna, sigur Aksel V. Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum*

skilji er rætt og slætt ikki, hvussu tey kunnu fáa tað burturúr avtaluni.

Men eg havi varhugan av, at blandingur er komin í málið um samstarvsavtaluna og málið um, at játtanin til serviðgerð uttanlands er løgd undir tríggjar yvirlæknar á Landssjúkrahúsinum.

- Arbeitt hevur í eina tíð verið við at leiðreglur fyri serviðgerð uttanlands og heimtøkuverkætlanir.

- Og eftir at málið er viðgjørt í sjúkrahússtjóraráðnum og strategiska leiðslubólkinum, gjørdi landsstýrismaðurin í heilsumálum síðsta summar av at leggja fíggjarligu ábyrgdina av játtanini til serviðgerð uttanlands og heimtøkuverkætlanir undir teir tríggjar leiðandi yvirlæknarnar á Landssjúkrahúsinum.

Bæði Jákup Petersen, yvirlækni í Klaksvík og Hans Petur Nielsen, yvirlækni á Tvøroyri, siga, at hetta var mest at samanlíkna við eitt kvett, tí hetta varð alt avgreitt í eini handavending síðsta summar, ímeðan umboð fyri tey bæði smáu sjúkrahúsini vóru uttanlands og ikki kundi møta á fundum um málið?

- Tað er rætt, at onkur fundur var í visitatiónsnevndini, uttan at teir báðir yvirlæknarnir vóru til staðar, men annars vóru onnur umboð til staðar fyri tey smáu sjúkrahúsini - í øllum førum vóru umboð til staðar fyri Klaksvíkar sjúkrahús.

- Men hetta er fyrst og fremst ein fyrisitingarlig avgerð, sum heilsumálaráðið hevur tikið sum evsti ábyrgarhavari.

### Aðrir bollar í suppuna

Tað, sum Hans Petur Nielsen fýlist at í nýggju samstarvsavtaluni, er, at hon er bara yvirskipað og at onki stendur í henni um, hvussu tey trý sjúkrahúsini ítøkiliga skulu samstarva?

- Nei, men hetta er ein karmur fyri, hvussu samstarvið skal vera og eg dugi rætt og slætt ikki at síggja trupulleikan. Útfrá hesi rammuavtaluni skulu so aðrar undiravtalur gerast um, hvørji øki samstarvast skal um og, hvussu tað samstarvið skal fara fram.

Higartil hava hvørki Klaksvíkar Sjúkrahús ella Suðuroyar Sjúkrahús viljað skrivað undir samstarvsavtaluna. Hvat hendir vissi tey halda fast um sína støðu?

- Tað er eitt greitt mál, at tey trý sjúkrahúsini skulu samskipast so at tey virka sum ein eind. Tað er eisini eitt greitt mál, at leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum skulu finna felags stev í semju. Vónandi vísa partarnir vilja til samstarv, so at tað eydnast innan rímiliga tíð. Men spyrst onki burtur úr innan rímiliga tíð, mugu aðrir bollar í súpanina, sum landsstýrismaðurin málber seg.

Hvat liggur í tí?

- Tað liggur tað í tí, at so má politiska skipanin og heilsumálaráðið onkusvegna skera út í kortið, hvussu samstarvið skal vera. Men so er samstundis svandi fyri, at tey trý sjúkrahúsini frásiga sær ávirkan á, hvussu samstarvið verður skipað. Tað er í øllum førum greitt, at ætlanin at samskipa tey trý sjúkrahúsini verður undir ongum umstøðum slept.

Merkir tað, at so verður tað heilsumálaráðið, sum sker ígjøgnum og sigur, hvussu samstarvið skal vera?

- Tað er ein spurningur sum skal viðgerðast politiskt. Men tað ber ikki til, at vit hava tríggjar sjúkrahúsleiðslur, sum ikki vilja samstarva

Fer tað so at fáa avleiðingar fyri leiðslurnar?

- Tað sigi eg ikki. Nú royna vit at finna semju við samráðingum, men eydnast tað ikki, má okkurt annað gerast.

### Ikki upp á tal

Hví ikki luta játtanina til serviðgerð uttanlands sundur ímillum tey trý sjúkrahúsini, soleiðis sum tey smáu sjúkrahúsini hava skotið upp?

- Tað kemur ikki upp á tal, tí nú er málið at samskipa virksemið á teimum trimum sjúkrahúsunum og sostatt kemur ikki upp á tal at seta skott ímillum tey tey. Vit skulu hava trý sjúkrahús og tað er ikki talan um at máa grundarlagið undan teimum smáu sjúkrahúsunum.

Tey smáu sjúkrahúsini føra fram, at tað hevur gingið illa hjá Landssjúkrahúsinum at halda játtanina og at tað er eitt stórt álit at vísa teimum at geva teimum 130 milliónir afturat at umsita í sambandi við játtanina til serviðgerð uttanlands.

- Eg havi ongar viðmerkingar til tað, sum er farið, men skulu vit hava positivt samstarv ímillum tey trý sjúkrahúsini, er tað neyðugt at líta frameftir

Tey smáu sjúkrahúsini staðfesta bæði at tað gongur illa at samstarva við Landssjúkrahúsið tí at sjúklingar verða heldur settur á bíðilista enn at teir verða sendir á Suðuroyar Sjúkrahús.

- Eg farið ikki at taka dagar ímillum, hvat sjúkrahús er herviligast at forða fyri samstarvi og nú er løtan komin at líta frameftir, er stutta viðmerkingin frá landsstýrismanninum til tað.